Suzuki Ignis 1.3 GL 4WD:

# Tykist størri innan enn uttan

**Suzuki Ignis, ið varð sýndur fram á bilaframsýningini í Bella Centrinum í november í fjør, er annar nýggi Suzuki sum er komin higar í summar. Í juli royndarkoyrdu vit Suzuki Liana**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Hóast Suzuki er ein gomul verksmiðja, er hon ikki so gomul sum bilverksmiðja. Fyritøkan varð stovnað í 1909 sum ein verksmiðja, ið framleiddi maskinur til klædnaídnaðin, so sum seymimaskinur o. a. Fyrstu motorsúkklurnar komu í 1952, og í 1955 framleiddu teir fyrsta bilin. Suzuki eru kendir fyri sínar framkomnu motorsúkklur og smáu persónbilar og jeepar. Í dag stendur Suzuki fyri søluni av einum triðingi av øllum fýrahjólsdrivnu bilum í Danmark.

### 2 ella 4 WD

Ignis er ein heilt nýggjur mini SUV bilur frá Suzuki, ið verður gjørdur við 3 og 5 hurðum. Talan er ikki um nakran beinleiðis "off-roadara", men ein kompaktan og rúmligan bil, ið eisini er væl egnaður til koyring har vegirnir ikki eru so góðir. Serliga er tað útgávan við fýrahjólsdrift, har fríhæddin og eitt viskodifferentiali, gera sítt til góðar eginleikar á vánaligum vegi.

### Nýggjur motorur

Tað fyrsta man leggur til merkis við bilinum innan er at hann er sera rúmligur, og man er við at halda, at hann er størri innan enn uttan.

Setrini stuðla væl og eru gjørd til at koyra langar túrar uttan at møðast.

Motorurin er ein nýggjur 1.3 litur bensin við 83 hk, ið er orkusparandi og umhvørvisvinarligur.

Bilurin er vælútgjørdur, og hevur t. d. ABS við EDB, dupultan airbag, startsperru, el-rútar farmman, el-síðuspegl, sentrallás og takstativ.

Ignis hevur 3 ára ella 100.000 km mekaniskt garanti og 12 ára garanti móti gjøgnumtering




Eyðbjørn Hansen við nýggjasta Suzuki Ignis 1.3 4WD, ið er ein rúmligur mini SUV




Suzuki Ignis fæst bæði við 2 og 4 hjóls drift



Ignis innan. bilurin tykist at vera størri innan enn uttan

SUZUKI

## Suzuki Ignis 1.3 GL 4WD 5/h

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.3 litur 4 syl 16V 83 hk |
| 0-100 km/t | 14,7 sek |
| Bensinnýtsla | 15.6 km/l |
| Dekkstødd | 165/70-14 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 362,0 cm |
| Breidd | 160,0 cm |
| Hædd | 159,0 cm |
| Eginvekt | 1000 kg |
| Viðførisrúm | 181 / 419 litrar |
| Prísur | kr.145.000,- |
| Søluumboð | Sp/f Eyðbjørn Hansen<br>Bilasøla og verkstaður<br>Varðagøta 75<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 313375 |


NÝTT FRÁ SUZUKI





Liana 1,3 og 1,6
Prísur úr 149.000,-

Ignis 1,3
(Fæst eisini við fýrahjóls trekki)
Prísur úr 131.000,-

SUZUKI Spf. Eyðbjørn Hansen Bilasøla og Verkstaður
Varðagøta 75 • FO-100 Tórshavn • Tel. 313375 og 213375 • Fax 31 14 95
Heimasíða: www.suzuki.fo • E-mail: suzuki@suzuki.fo • Opið er mánad. - fríggjad. kl. 08.00-16.10




# Flott bilstereo frá Marconi

**Nýggi handilin, Marconi, í gongugøtuni í Havn selir bilstereo av slagnum Panasonic. Prísurin er úr sløkum 5.000 krónum til 30.000 krónur**

BILSTEREO
*Rólant W. Dam*

Teir nýklaktu bilførararnir vilja fegnirhava ein flottan bil. Men ofta hava teir ikki ráð til at ov stórur íløgur, tí at teir eru kanska eru í holt við eina útbúgving, ella í læru. So bilurin verður ofta ikki so dýrur, men tá ið bilurin ikki kostar nógv, kunnu teir finna uppá at keypa eitt dýrt stereoanlegg.

Niðri við ljóskurvina í Niels Finsensgøtu liggur handilin Marconi, sum umframt at selja sjónvørp, stereoanlegg og aðra tekniska útgerð, eisini selur bilsterioútbúnað.

Og hetta umfatar alt til slíkan sterioútbúnað: Subwoofarar, hátalarar, fløguspælarar o. a. Prísurin fyri anleggini er úr knapt 5.000 krónum og upp til 30.000 krónur – íroknað hesum prísinum er uppsetan.

Bilstereoanlegginið eru av merkinum Panasonic. Eigarin av handlinum, Charles J. Olsen, hevur valt einans at selja Panasonic-anlegg.

– Orsøkin til at eg selji Panasonic er, at kundin vil hava hetta merkið. Panasonic er sera frammalaga, tá tað snýr seg um design, sigur Charles J Olsen, ið eigur og rekur Marconi.

Í handilinum er eitt lítið myrkt rúm, har ymisk bilradio eru upp sett. Og her kemur tað rættuliga til sjóndar hvussu flott tey eru.

Men hóast bilradio eru Panasonic, merkir tað ikki at alt teir selja er av tí slagnum. Hátalarinir eru av týska merkinum Helix, ið er kent fyri høga góðsku, fyri ein sámuligan penga, ella sum danir siga »høj kvalitet, til en husmandspris«.




*– Orsøkin til at eg selji Panasonic er, at kundin vil hava hetta merkið. Panasonic er sera frammalaga, tá tað snýr seg um design, sigur Charles J Olsen, ið eigur og rekur Marconi*



## Jaguar Kombi

Eftir at nýggi Jaguar X-Type er vorðin so sera væl móttikin á fleiri marknaðum, eitt nú í Týsklandi, eru ætlanir frammi um at gera ein X-Type stationvogn

*Kelda: Motor Magasinet*



## 4000 Hyundai brunnu

Eitt koreanskt skip á veg til Evropa við 7000 Hyundai bilum brann herfyri út fyri malaysisku strondini. 4.000 av bilunum kundu ikki brúkast aftur.

Av teimum 372, sum komu í land í Fredericia, vóru 50 totalt útbrendir.

*Kelda. Motor Magasinet*


# Tað loysir seg at viðlíkahalda bil tygara

Regluligt viðlíkahald og ábøtur á slit er umráðandi um tú vilt varveita tín bil tryggan og álítandi og samstundis fáa besta prísin, tá tú selur hann aftur. Tín Ford forhandlari er tann besti tú kanst fara til við bilinum. Vit leggja okkum altíð eftir at bjóða eina enn betri og meiri álítandi tænastu og at gera umvælingar til lagaligar prísir. Tín bilur er altíð í góðum hondum hjá okkum, um honum nýtist eftirsýn ella t.d. dekkskift.

## Prísir á kilometur eftirlitum / við olju og filtur

| Model | Motor | 15.000 km/1 ár | 30.000 km/2 ár | 45.000 km/3 ár | 60.000 km/4 ár |
|---|---|---|---|---|---|
| Ka | 1.3 endura | kr. 1.712,93 | kr. 1.712,93 | kr. 2.420,50 | kr. 1.712,93 |
| Puma | 1.4 Zetec-se | kr. 1.512,24 | kr. 1.512,24 | kr. 2.109,08 | kr. 1.868,90 |
| Fiesta | 1.3 endura | kr. 1.636,01 | kr. 1.636,01 | kr. 2.217,80 | kr. 1.636,01 |
| Fiesta | Zetec-se | kr. 1.358,43 | kr. 1.358,43 | kr. 1.801,45 | kr. 1.638,18 |
| Mondeo | Diesel | kr. 1.858,00 | kr. 1.858,00 | kr. 2.473,38 | kr. 1.858,00 |
| Focus | Diesel | kr. 1.780,68 | kr. 1.780,68 | kr. 2.730,89 | kr. 1.780,69 |
| Escort | Diesel | kr. 1.296,96 | kr. 1.288,84 | kr. 2.134,18 | kr. 1.296,96 |
| Galaxy | Bensin | kr. 1.881,90 | kr. 1.881,90 | kr. 1.958,80 | kr. 2.526,46 |
| Galaxy | Diesel | kr. 2.097,33 | kr. 2.351,54 | kr. 2.097,33 | kr. 2.351,54 |

| Model | Motor | 20.000 km/ 1 ár | 40.000 km/2 ár | 60.000 km/3 ár | 80.000 km/4 ár |
|---|---|---|---|---|---|
| Focus | Zetec/se 1.4 | kr. 1.586,03 | kr. 1.313,18 | kr. 2.107,25 | kr. 1.313,18 |
| | Zetec/se 1.6 | kr. 1.635,73 | kr. 1.362,88 | kr. 2.156,95 | kr. 1.362,88 |
| | Zetec/se 1.8 | kr. 1.635,73 | kr. 1.362,88 | kr. 2.444,85 | kr. 1.362,88 |
| | Zetec/se 2.0 | kr. 1.635,73 | kr. 1.362,88 | kr. 2.444,85 | kr. 1.362,88 |

| Model | Motor | 20.000 km/1 ár | 40.000 km/2 ár | 60.000 km/3 ár | 80.000 km/4 ár |
|---|---|---|---|---|---|
| Mondeo | Duratec-He | kr. 1.635,73 | kr. 1.362,88 | kr. 2.839,69 | kr. 1.362,88 |
| | Duratec-Ve | kr. 1.769,53 | kr. 1.496,68 | kr. 1.708,15 | kr. 1.496,68 |

| Model | Motor | 25.000 km/1 ár | 50.000 km/2 ár | 75.000 km/3 ár | 100.000 km/4 ár |
|---|---|---|---|---|---|
| Transit | Diesel | kr. 1.653,96 | kr. 1.762,30 | kr. 1.653,96 | kr. 1.804,49 |

Fyrimunir

EIGARI

Tryggleiki

Økt brúktbilavirði

Vælvild til nakrar garanti umvælingar upp til 3 ár

FORD

P/f Wenzel
Akranesgøta 5 • 100 Tórshavn • tlf. 313873 • www.wenzel.fo

Okkara dygd – tygara trygd

Fyrivarni verður tikið fyri prísbroytingum
Eyka: annað hvørt ár verður bremsiveskan skift út – Pollenfiltur um neyðugt